# Samskiparar, stuðlar og umlættingarstuðlar til Stuðulsfólkaskipanina fyri børn

## Leys størv

**Samskiparar**
Vit sóknast eftir fólki við viðkomandi námsella heilsufrøðiligari útbúgving, ella sum hava serliga førleikagevandi royndir. Samskipararnir koma at fáa ein týðandi leiklut í arbeiðinum at skapa og menna nýggju Stuðulsfólkaskipanina.

Samskipararnir koma at virka sum stuðlar, men fáa tillutað eitt ávíst tímatal til samskipanaruppgávur. Tímatalið til samskipan verður lagað til tørvin í hvørjum øki sær. Samskipararnir koma, afturat stuðulsuppgávuni, at hava ta beinleiðis samskipanina í stuðulsøkinum um hendi í tøttum samstarvi við ráðgevaratoymið og fyrisitingina í Stuðulsfólkaskipanini. Samskipararnir skulu vera við til at gera samstarvsavtalur við foreldur um stuðulsuppgávurnar, eftirmeta stuðulsarbeiðið og hava umsjón við, at stuðulsarbeiðið fer fram sum ætlað. Tí verður eisini dentur lagdur á, at samskipararnir hava evni at orða seg skrivliga og munnliga, og at teir hava telduførleika á brúkarastøði.

**Stuðlar**
Vit sóknast eftir stuðlum at ansa, stuðla og menna børn, ið bera brek, heima hjá familjunum og í stuðulsstovum hjá Stuðulsfólkaskipanini. Søkt verður í fyrsta lagi eftir fólki við námsfrøðiligari-, heilsufrøðiligari ella aðrari hóskandi útbúgving, og eftir hjálparfólkum við royndum innan økið. Stuðulsfólk koma at arbeiða sera tætt við familjunum, og arbeiðið fer í mongum førum fram í heimunum hjá børnunum. Evni at tillaga seg, at hava tol og at samstarva eru tí av alstórum týdningi, og eisini evnini at seta neyðug og hóskandi mørk.

Søkt verður eftir stuðulsfólkum til føst størv, summi við føstum tíðum, og onnur í skiftivaktum.

**Umlættingarstuðlar**
Søkt verður eftir umlættingarstuðlum at ansa børnum ávís kvøld og vikuskifti. Umlættingarstørvini verða tímalønt og tíðaravmarkað eftir avtalu. Eingi formlig krøv verða sett, men royndir úr líknandi starvi er ein fyrimunur. Persónligu krøvini eru eins og fyri hini stuðulsstørvini.

**Avloysarar**
Eisini verður søkt eftir tímaløntum stuðlum til avloysarauppgávur, hesir verða vanliga settir í minni enn 15 tímar um vikuna.

**Umsóknarfreistin er 19. apríl 2006**
Størvini verða sett so líðandi í tíðarskeiðinum frá 1. mai til 1. september 2006. Skrivlig umsókn, prógv og viðmæli skulu sendast til:

Stuðulsfólkaskipanina fyri børn,
Almannastovan, Smyrilsvegur 20,
Postboks 3096, 110 Tórshavn.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Oyvind av Skarði, deildarleiðara, ella Ragnhild Dahl, stuðulsráðgeva, tel 35 35 10.

Stuðulsfólkaskipanin fyri børn søkir eftir námsfrøðingum, sjúkrarøktarfrøðingum, heilsustøðingum, ergo- og fysioterapeutum og fólki við øðrum viðkomandi útbúgvingum, umfram hjálparfólkum at manna stuðulsfólkaskipanina.

Stuðulsfólkaskipanin fer í tvørfakligum samstarvi at virka fyri at skapa góðar heildarætlanir fyri tað einstaka barnið. Stórur dentur verður tí lagdur á sjálvstøðugt arbeiðslag og góð samstarvsevni. Samstarvið fevnir eisini um brekdeildina og økisdeildirnar á Almannastovuni, sum veita heildarráðgeving til familjur við børnum ið bera brek. Talan er um nýggja skipan, sum skal mennast næstu árini. Neyðugt er tí, at umsøkjararnir tola broytingar í starvinum, bæði hvat viðvíkur innihaldi og arbeiðstíðum.

Stuðulsfólkaskipanin virkar um alt landið. Stuðulsfólk fara í høvuðsheitum at verða sett í einum ávísum øki, men kunnu verða flutt í annað øki eftir tørvi. Stuðulsøkini kunnu eisini verða umskipað samsvarandi broyttum tørvi í økinum.




### Suðurstreymoyar øki

**Stuðulstoymi fyri fjølbrekað**
Søkt verður eftir samskipara, stuðlum til dagvaktir, skiftivaktir og/ella fastar náttarvaktir umframt eftir avloysarum. Umsøkjarar við útbúgving og royndum við fjølbrekaðum, og sum hava hug at menna seg innan økið, hava fyrimum. Arbeiðið verður samskipað um stuðulsstovuna í Ovaragøtu í Hoyvík, og fer fram í stuðulsstovuni og heima hjá børnunum. Talan er bæði um námsfrøðiligar- og røktaruppgávur.

**Toymi fyri autistar**
Søkt verður eftir einum samskipara, stuðlum og hjálparfólki at stimbra og menna børn við autismu eftir skúlatíð. Umsøkjarar við útbúgving og royndum innan autismu, og sum hava hug at menna seg innan økið, hava fyrimum.

**Skúlatoymi**
Søkt verður eftir einum samskipara, stuðlum og hjálparfólki at stimbra og menna menningartarnaðum børnum eftir skúlatíð. Talan er burturav um námsfrøðiligar uppgávur, at fylgja børnunum til ymisk ítriv, at menna tey sosialt og yvirhøvur at skipa eitt innihaldsríkt frítíðartilboð.

### Vága/Norðstreymoyar øki

**Tvørfakligt stuðulstoymi**
Søkt verður eftir samskipara, stuðlum, av loysarum og umlættingarstuðlum. Talan er um bæði námsfrøðiligar- og røktaruppgávur.

### Eysturoyar øki

**Toymi fyri autistar**
Søkt verður eftir einum samskipara, stuðlum og hjálparfólki til børn við autismu eftir skúlatíð. Umsøkjarar við útbúgving og royndum innan autismu, og sum hava hug at menna seg innan økið, hava fyrimum.

**Skúlatoymi**
Søkt verður eftir einum samskipara, stuðlum og hjálparfólki at stimbra og menna menningartarnaðum børnum eftir skúlatíð. Talan er um námsfrøðiligar og røktaruppgávur umframt fylgjarauppgávur.

### Norðoyar øki

**Tvørfakligt stuðulstoymi**
Søkt verður eftir samskipara, stuðlum, avloysarum og umlættingarstuðlum. Talan er um bæði námsfrøðiligar- og røktaruppgávur.

### Sandoyar øki

**Tvørfakligt stuðulstoymi**
Søkt verður eftir samskipara, stuðlum, avloysarum og umlættingarstuðlum. Talan er um bæði námsfrøðiligar- og røktaruppgávur.

### Suðuroyar øki

**Tvørfakligt stuðulstoymi**
Søkt verður eftir stuðlum, umlættingarstuðlum og avloysarum. Talan er um bæði námsfrøðiligar- og røktaruppgávur.

---

Flestu stuðulsuppgávurnar eru seinnapartar, um kvøldið og um náttina, og vanligastu størvini eru tí 20 – 30 tímar um vikuna, tó eru eisini heildagsstørv.

Umlættingarstuðlar hava sum oftast eitt vikuskifti um mánaðin.

Øll størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

stuðulsfólkaskipanin fyri børn
www.almannastovan.fo

Stuðulsfólkaskipanin fyri børn er skipan á Almannastovuni, sum veitir stuðul til heimabúgvandi børn, ið bera brek. Stuðulsfólkaskipanin fevnir um alt landið. Í skipanini starvast í løtuni uml. 100 fólk. Játtanin í 2006 er uml. kr. 17 mió. Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.

KREA.FO - TEL 47 80 80